# Fyrilestur um koyrilsbrest

**Nú kemur kendi danski serlæknin, Øivind K. Mathiasen, aftur til Føroya. Hesaferð steðgar hann eina viku í Føroyum. Umframt at viðgera fólk við koyrilsbresti, fer hann eisini at halda fyrilestur um nakka- og bleytholdsskaðar**

HEILSA OG VIÐGERÐ
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Komandi týskvøld fer Øivind K. Mathiasen at halda áhugaverdan fyrilestur um nakka- og bleytholdsskaðar. Fyrilesturin, sum er almennur, verður í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum klokkan 20.00.

Hetta er triðja ferðin hjá Øivindi hiðar, og hesaferð steðgar serlæknin eina viku í Føroyum. Umframt á Argjum, fer hann eisini at viðgera í Eysturoynni, Klaksvík og á Tvøroyri.

Ein av teimum, sum hevur drigist við ógvusligar plágur orsakað av koyrilsbresti, er Leivur Sørensen í Syðrugøtu.

Av tilvild hoyrdi hann um danska læknan og leitaði sær hjálp hjá honum. Eftir fáar viðgerðir, var týðiligur bati hjá Leivi, sum hevði verið sjúkur í 25 ár.

Leivur var í viðgerð í Danmark fleiri mánaðir. Heimaftur komin fór hann undir at royna at fáa læknan at koma til Føroya, og var hann her fyrstu ferð í september.

### Hjálp at fáa

Øivind K. Mathiansen er útbúgvin lækni. Hann sigur, at hann hevur ikki funnið uppá nakað nýtt, men bert granskað í tí tilfari, sum fanst frammanundan.

- Alt byrjaði, tá eg starvaðist á pínudeildini á intensivdeildini í Esbjerg. Tað vóru so nógv, eg ikki fekk hjálpt við tí viðgerð, eg kundi geva, sigur hann.

Eftir áheitan byrjaði hann at hyggja nærri at ymiskum alternativum viðgerðarhættum. Og tá hann hevði tikið øll skeið, ið funnust í danska ríkinum, fór hann uttanlands at læra meiri.

Í læknaliga fakliteraturinum stendur, at varandi koyrilsbrestur er ólekjandi, men hetta er ikki so.

- Mínar royndir eru, at øll, sum líða av "piskesmæld", kunnu hjálpast og í nógvum førum lekjast fullkomiliga, sigur danski læknin.

Ein av trupulleikunum við koyrilsbresti er, at røntgenmyndir og skanningar sjáldan avdúka skaðan.

Hetta kemst av, at broytingar í bleytholdinum ikki kunnu mátast. Tað ber bara til at føla tær við fingrunum, og til tað krevst venjing.

Tað er sum at spæla á klaver ella at koyra bil. Tú kanst ikki lesa teg til tað.

### Flestu gerast frísk

Er koyrilsbresturin varandi, er alneyðugt at koma í viðgerð, og tey flestu gerast heilt frísk.

Ikki allir sjúklingar hava eins nógvar viðgerðir fyri neyðini. Summi verða frísk eftir heilt fáum viðgerðum hjá Øivindi.

Nógv fólk fara ígjøgnum langar viðgerðir hjá fysioterapeutum. Summi við góðum úrslitum - onnur fáa ikki hjálp.

Fysioterapeutarnir í dag eru væl útbúnir, men tey hava eitt øki, sum tey mugu halda seg innanfyri.

Um skaðin sitir tætt at hámønuni, skulu tey steðga viðgerðini har.

- Sum lækni havi eg ein annan førleika og heimild, og ta ábyrgdina skal eg tora at átaka mær, sigur Øivind.

Á ferðunum í Føroyum hevur Øivind K. Mathiasen viðgjørt ein hóp av fólki, og listin av sjúklingum er langur aftur hesaferð.



*- Mínar royndir eru, at øll, sum líða av "piskesmæld", kunnu hjálpast og í nógvum førum lekjast fullkomiliga, sigur danski læknin, Øivnd K. Mathiasen. Hann kemur nú til Føroya fyri triðju ferð*
*Mynd: Maria Olsen*





*Er koyrilsbresturin varandi, er alneyðugt at koma í viðgerð, og tey flestu gerast heilt frísk. Ikki allir sjúklingar hava eins nógvar viðgerðir fyri neyðini. Summi verða frísk eftir heilt fáum viðgerðum hjá Øivindi*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

**Móttøka á Føroya Sjómansskúla**

Nú 110 ár eru liðin síðani farið varð at útbúgva skiparar í Føroyum, og at bókin "Sigling og útbúgving I" hjá Óla Olsen verður løgd fram, verður bjóðað til móttøku á Føroya Sjómansskúla leygardagin 8. november frá kl. 15 til 18.

Sosialurin 341800

**Føroya Sjómansskúli**

HÚÐRØKT
v. Mari...

Eg eri flutt ...
í egin høli á Niels Finsensgøtu 38
(har Bethel var fyrr).
*Maria*

Cosméto
vakurleiki og vælvera
N. Finsensgøta 38, kj. · Tlf. 31 80 70

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at góða svigarinna, mostir og fastir okkara

**Sofie J. Christensen**
**ættað úr Skopun**

andaðist í Minneapolis í USA 1. oktober,
93 ára gomul.

*Familjunnar vegna,*
**Eli Johannessen**



# Nikolaj og Julie tekur øll met

**Vælumtókta sjónvarpsrøðin, Nikolaj og Julie, tekur øll hyggjaramet á sjónvarpssrásini DR. Heili 1.750.000 fólk hugdu sunnukvøldið at seinasta parti av røðini, og tað eru enn fleiri hyggjarar enn trúlovilsið hjá Fríðriki og Mary Donaldsson kundi savna saman.**

HYGGJARAMET
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Endin á sjónvarpsrøðini, Nikolaj og Julie, var uttan iva stóra kjakið á nógvum kaffistovum mánadagin. Sjónvarpsrøðin hevur verið sera vælumtókt í Føroyum, og nógv ung sum gomul hava við stórum spenningi fylgt við hvørt sunnukvøld.

Í Danmark hevur røðin eisini verið ómetaliga vælumtókt. BT skrivar, at sunnudagin hugdu í alt 1.750.000 fólk eftir seinasta partinum av røðini. Hyggjaratalið sunnukvøldið var størri enn trúlovilsið hjá Fríðriki og Mary, og tað sigur ikki heilt lítið. Í alt hava 38 mio. fólk sæð teir 22 partarnar.

Leysatíðindi vilja verða við, at seinasti partur av Nikolaj og Julie varð tikin upp við fýra ymiskum handritum. Hetta varð gjørt fyri, at eingin skuldi fáa frænir av, hvussu sendirøðin endaði. Søren Sveistrup, ið hevur skrivað handritið, sigur við BT, at ætlanin var alla tíð, at sendirøðin skuldi enda við, at Nikolaj og Julie funnu saman aftur

Peter Mygind, ið spældi Nikolaj, sigur við Ekstrablaðið, at seinasta scenan varð tikin upp heili 42 ferðir. Teir 42 svimjitúrarnir høvdu eisini við sær, at Peter Mygind lá sjúkur eftir upptøkurnar.

Tað er ikki bara í Føroyum og Danmark, at sendirøðin, Nikolaj og Julie, er vælumtókt. Danska sendirøðin er útnevnd til at kappast um eina Emmy seinni í ár.

# Sølurásin 2003 á Skála

TÍÐINDASKRIV

Aftur í ár verður skipað fyri sølustevnu á Skála undir heitinum SøluRásin 2003. Stevnan verður komandi vikuskiftið 8. og 9. november. Tað eru tey fýra feløgini á vestara armi á Skálafjørðinum, Stranda Ítróttarfelag-Strálan-Skála Ítróttarfelag og Skála Róðrarfelag sum skipa fyri.

Stevnan hevur verið sera væl vitjað og hava tey sum hava sýnt fram sínar vørur dámt sera væl. Høllin er full av framsýnarum og er tað ógvuliga fjølbroytt. Her er so møguleiki at fáa keypt sær jólastásið ella fáa avgreitt jólagávurnar í góðari tíð.

Umframt mótasýningar verður ymiskt til undirhalds-nevnast kann leygardagin 8. nov. kemur Magni Christiansen at syngja. Teir væl umtóktu klovnarnir og búktalarin koma at undirhalda. Kvøldið endar við, at Jónsvein og Birgir undirhalda á pallinum við sangi.

Sunnudagin kemur Angela og Hannibal at undirhalda børnunum- nøkur børn frá Prix Føroyar 2003 tiltakinum koma at syngja. Síðsta tiltak hetta kvøldið verður at Jens Marni Hansen og Ólavur Øster koma á pallin at undirhalda.



*Høllin á Skála verður aftur karmur um SøluRásina í ár*

# Evnisdagur um almannalóggávu í Norðurlondum

EVNISDAGUR
*Tíðindaskriv*

10 november skipar almannaráðið fyri evnisdegi um norðurlendska almannalóggávu. Á evnisdegnum verður kunnað um, hvussu almannalóggávan í teimum ymisku Norðurlondunum verður umsitin og fíggjað. Tað verður eisini nortið við innihaldið av hesum veitingum.

Evnisdagurin snýr seg um brekaðøkið, dagpening, pensjónir, barna- og familjuveitingar og arbeiðsskaðatrygging. Hetta eru øki, sum í Føroyum hoyra undir landsstýrismanninum í almannamálum. Harumframt snýr evnisdagurin seg um øki, sum her heima hoyra undir onnur málsøki, til dømis arbeiðsloysistrygging, barsilsskipan, sjúkratrygging, primera og sekundera heilsuøkið og heilivág

Á evnisdegnum undirvísa Jan-Åke Brorsson úr Svøríki og Linda Winding-Sørensen úr Noregi. Brorsson er útbúgvin samfelags- og búskaparfrøðingur, og starvast sum búskaparstjóri í svenska Forsåkringskasseforbundet. Harumframt hevur hann í nógv ár verið virkin í norðurlendskum samstarvi, m.a. við at halda skeið um almannalóggávu.

Liv Winding Sørensen er serfrøðingur í pensjónsøkinum og hevur arbeitt við almannaveitingum í norska Rikstrygdeverket í nógv ár. Eisini hevur hon drúgvar royndir í norðurlendskum samstarvi, umframt at halda skeið um pensjónsøkið og familjuveitingar í Norðanlondum.

Kostnaður fyri evnisdagin er 300 fyri hvønn luttakara, sum verður rindað á kontu nr. 6460-407.600.3 í Føroya Banka við tilskilan av navni og viðmerkt "Evnisdagur"



### Skrá

Kl. 9.00-9.15 Landsstýrismaðurin, Páll á Reynatúgvu, setur evnisdagin

Kl. 9.15-10.15 Jan Åke Brorsson: Almannatrygging í Norðanlondum

Kl.10.15-10.45 Kaffi

Kl. 10.45-11.45 Liv Winding Sørensen: Pensjónstrygging í Norðanlondum

Kl. 11.45-13.00 Frokost

Kl.13.00-14.00 Jan Åke Brorsson: Sjúkratrygging í Norðanlondum

Kl.14.00-14.30: Kaffi

Kl.14.30-15.30: Liv Winding Sørensen: Familjutrygging í Norðanlondum

# Partarnir eru positivir

**Peningastovnarnir og embætisfólk, ið arbeiða við at yvirtaka fíggjarmál, høvdu ein kunnandi fund seinasta hósdag. Landsstýrismaður í fíggjarmálum, Karsten Hansen, sigur, at fundurin gekk væl, og partarnir tykist rættiliga positivir**

KUNNING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Hósdagin kunnaðu embætisfólk føroysku peningastovnarnar um yvirtøkuna av fíggjarmálum. Føroya Sparikassi vísti í farnu viku á, at peningastovnurin metir seg ikki hava fingið nøktandi innlit í ætlaðu yvirtøkuna av fíggjarmálum. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, var ikki hjástaddur á fundinum hósdagin, men hann letur kortini væl at fundinum.

– Eg havi fingið fortalt, at fundurin gekk rættiliga væl, og báðir partar vóru rættiliga positivir, sigur fíggjarmálaráðharrin.

Í løtuni arbeiða tveir arbeiðsbólkar við yvirtøkuni av fíggjarmálum. Í Føroyum eru fólk frá embætisverkinum og landsbankanum, meðan danir eisini hava sett ein bólk við embætisfólkum at umrøða yvirtøkuna.

Landsstýrið hevur sett út í kortið at yvirtaka fíggjarmál á ólavsøku komandi ár. Yvirtøkulógin kemur eftir ætlan í gildið komandi ólavsøku, og fíggjarmál eru ein partur av yvirtøkulógini.